gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Nú vendst ikki aftur hjá Høgna Joensen

**Tá ið aðalstjórin í Almanna- og heilsumálastýrinum kom til arbeiðis í gjáramorgunin, stóðu tey fyri honum við eini uppsøgn**

UPPSØGN
Áki Bertholdsen

Nú vendst ikki aftur hjá Høgna Joensen. Nú er hann endaliga sagdur upp sum aðalstjóri á Almanna- og heilsumálastýrinum.

Tað var síðst í mars mánaða, at Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, boðaði frá, at ætlanin var at siga Høgna Joensen, aðalstjóra, úr starvi. Tá fekk Høgni Joensen skrivlig boð um, at ætlanin varð at siga hann upp. Eftir at hava fingið hesa fyribils uppsøgnina, hevði aðalstjórin eftir lógini 14 dagar at gera sínar viðmerkingar til málið. Men hann skuldi ikki møta til arbeiðis í hesari hoyringsfreistini.

Tær viðmerkingarnar hevur hann nú gjørt.

Men tær broyttu ikki støðuna: Mikudagion fekk hann endaligu uppsøgnina.

Freistin at lata viðmerkingarnar inn var úti týsdagin og tí møtti Høgni Joensen til arbeiðis mikumorgunin.

Men tá ið hann komn til arbeiðis, stóðu tey fyri honum við endaligu uppsøgnini.

Høgni Joensen er tænastumaður hevur tríggjar mánaða uppsagnarfreist. Sostatt er hann endaliga loystur úr starvi tann 31. juli.

## Persónligar eginleikar

Orsøkin til, at hann er sagdur úr starvi, er, at landsstýrismaðurin, Løgmaður og Løgmansstjórin, Marjun Hanusardóttir, halda ikki, at hann hevur teir neyðugu, persónligu eginleikarnar til at røkja starvið.

Tey vísa á, at Almanna- og heilsumálastýrið hevur ikki virkað væl og at tað er Høgni Joensen, sum hevur evstu ábyrgdina av stýrinum.

Sámal Petur í Grund sigur, at nú verður lýst eftir nýggjum aðalstjóra.Til nýggjur aðalstjóri er settur, røkir Maria á Dul starvið.

## Ikki síðsta orðið

Hóast tað nú er endaliga greitt, at Høgni Joensen er sagdur upp, er síðsta orðið ikki sagt í málinum enn. Eitt nú hevur Kristian Magnussen, løgtingsmaður, reist málið í tinginum, har hann hevur sett Sámal Petur í Grund nakrar fyrispurningar í málinum.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Høgna Joensen í gjár. Men tá ið hann fekk at vita, at hann skuldi sigast upp, segði hann, at góðtók hann ikki uppsagnarfreistina, fór hann víðari við málinum, eisini í rættin, um neyðugt.



*Tað er nú endaliga greitt, at Høgni Joensen skal úr starvinum sum aðalstjóri í Almanna- og heilsumálastýrinum. men síðsta orðið er ikki sagt í málinum enn*


# Sølufólk til SKF-deildina

Vit søkja eftir einum sølufólki til okkara SKF-deild. Viðkomandi skal hava dagligu ábyrgdina av deildini og kemur at samstarva við hinar deildinar hjá P/F Esmar Simonsen.

**Vit vænta at tú**
- ert kundavinarlig/ur,
- ert fyrikomandi,
- hevur góð samstarvsevni,
- ert maskinmeistari, maskinteknikari ella hevur aðra viðkomandi útbúgving,
- ert køn/ur í føroyskum, donskum og enskum í bæði skrift og talu
- hevur teldukunnleika innan Navision, Office-pakkan og aðrar tilhoyrandi skipanir
- kanst byrja skjótast gjørligt

**Vit bjóða**
Eitt spennandi og mennandi starv, har tú dagliga kemur at hava kontakt við tann føroyska ídnaðin. Arbeiðið umfatar alla sølu og ráðgeving av SKF-legum og transmissiónslutum.
Lønin verður eftir avtalu.

Ljóðar hetta at vera nakað fyri teg, so send eina umsókn við CV og avritum av møguligum prógvum og viðmælum til:

**P/f Esmar Simonsen,**
**Kambsdalur**
**530 Fuglafjørður**

**Umsóknarfreistin er 27. apríl 2001.**

Hevur tú onkrar spurningar viðvíkjandi starvinum ert tú vælkomin at ringja til Karl Birgir á tel. 214406 ella tel. 444405.

**P/f Esmar Simonsen**
Kambsdalur • Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29

Vikublaðið 321000


# Nýtt fiskavirki í Lopra

**– Um nakrar vikur letur eitt nýtt fiskavirki upp í Lopra. Tað er eitt virki, sum hevur verið í Oyndarfirði, sum nú flytur suður**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*

Um nakrar vikur er tað ætlanin, at eitt nýtt fiskavirki skal lata upp í Lopra.

Tað er Hendrik Tausen, sum hevur havt fiskavirki í Oyndafirði, sum nú flytir virksemi sítt til Suðuroyar.

Hann hevur leigað húsið, sum Jákup Joensen eigur á bryggjuni í Lopra til endamálið.

Á økismenningarfundinum, sum var í Vági mánakvøldið, upplýsti Jákup Joensen, at hann mánadagin hevði undirskrivað sáttmála við Hendrik Tausen sum at leiga virkið. Men eftir, havt skilst, eru eisini møguleikar fyri í sáttmálanum, at Hendrik Tausen seinni keypir virkið.

Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa fatur á Hendrikki Tausen. Men, eftir, hvat skilst er tað ILA sjúkan í Oyndafirði, sum ger, at hann flytir virksemið sítt haðani, tí ímeðan Oyndarfjørður er avbyrgt, er tað ov trupult at hava vinnu har.

Vit hava eisini skilt, at á virkinum í Lopra verða eini 20-30 arbeiðspláss, tá ið avtornar.

Spurningurin er, hvussu nógvum suðuroyingum verður brúkt fyri, tí á virkinum í Oyndafirði hava einir 12-13 útlendingar arbeitt, í høvuðsheitum teilendingar.

Vit hava skilt, at ætlanin er, at teir skulu fylgja við suður á virkið í Lopra at arbeiða.



*Tað er ikki heilt so steindeytt í útjaðaranum, ið summi vilja ger at tað til, segði Jákup Joensen á Økismenningarfundinum í Vági mánakvøldið. Sjálvur hevur hann nú leiga húsið, hann eigur á bryggjuni í Lopra, til eitt fiskavirki, sum skal flyta úr Oyndafirði, til Suðuroyar*

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Bygging av Landssjúkrahúsinum byrjar 7. mei

BYGGING
*Stefan í Skorini*

Týsdagin seinnapartin vóru fimm sáttmálar undirskrivaðir við entreprenørar, sum skulu standa fyri bygging av Landssjúkrahúsinum. Arbeiðið, sum byrjar 7. mei, er mett at kosta 92 milliónir krónur, og tað skal eftir ætlan verða liðugt um trý ár. Fundamentið er liðugt, og tí kann arbeiðið uppá sjálvan bygningin fara í gongd.

Tað er Landsverkfrøðingurin, sum skal umsita byggingina fyri Vinnumálastýrið. Tað var annars Almanna- og Heilsumálastýrið, sum legði lunnar undir arbeiðið, men síðani er skipanin broytt soleiðis, at Vinnumálastýrið skal hava allar bygningar í landinum um hendi. Tí var tað Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, ið handaði Oyvindi Brimnes sáttmálarnar, sum hann síðani undirskrivaði.



*Tann 7. mei verður farið undir at byggja nýggjan bygning til Landssjúkrahúsið, og týsdagin vóru teir endaligu sáttmálarnir undirskrivaðir á Hotel Hafnia*

Mynd: Jens Kr. Vang

Phil & Søn skal standa fyri byggiarbeiðinum, Glentco skal standa fyri hita og ventilatión og KB el-teknik hevur fingið arbeiðið at leggja streymin. Árni Winther, arktitektur hevur teknað, og verkfrøðingarnir hava verið frá Landsbyggifelagnum, P/F Sofus M. Jakobsen og íslendska verkfrøðingafelagnum Vsó.

# Nýggj bók um Reyða Kross

**Spildurnýggj bók um Reyða Kross er júst útgivin, og er tað Edvard í Skorðini, sum hevur skrivað. Bókin lýsir tíðina í Reyða Krossi frá 1926 – 2001**





REYÐI KROSSUR
*Heini í Skorini*

Nýggja bókin “Reyði Krossur Føroya” frá 1926 – 2001 er ein spildurnýggj føroysk bók um Reyða Kross, og fevnir hon um arbeiðið hjá Reyða Krossi líka frá byrjan av og upp til okkara tíðir. Bæði virkið hjá hesum felagsskapi í Føroyum og uttan úr heimi er lýstur í bókini, og er bókin 75 síður.

Sum sagt eru heimlig viðurskifti lýst, men eisini søgan um alheims Reyða Kross og Reyða Hálvmána er frágreidd og lýst í bókini.

Evni, sum ikki fyrr hava verið viðgjørd í Føroyum, eru fleiri. Nær og hvussu byrjaði “Sjúkrasystratænastan”? Nær byrjaði frálæran um fyrstu hjálp? Nær og hvussu varð tilbúgvingin av bjargingarringum og børum lagdar út um landið o.s.fr. Eisini er skrivað í hesi bók, at Reyði Krossur Føroya setti tilbúgvingarfólk í 1942 at fyrireika hjálp, tá seinni heimsbardagi einaferð var av.

Einars Prent hevur prentað bókina, og kostnaðurin fyri “Reyði Krossur Føroya” í bókabúðum er 115 krónur, meðan limir fáa bókina fyri 95 krónur.

# Føroya Stiftstjórn offur fyri telduhakkarum

**Ein telduhakkari hevur fyri stuttum hakkað seg inn á heimasíðuna hjá Føroya Stiftstjórn, og hevur viðkomandi misnýtt heimasíðuna hjá Stiftstjórnini til ymiskt. Fleiri onnur virki eisini hava verið offur fyri slíkum**

TELDUHAKKARAR
*Heini í Skorini*

Fyri stuttum fekk Føroya Stiftstjórn ein hvøkk, tá tey varnaðust, at alt ruggaði ikki rætt inni á heimasíðuni hjá teimum á intertetinum. Ein telduhakkari hevði hakkað seg inn á heimasíðuna hjá Føroya Stiftstjórn, og út frá hesi heimasíðu hevði hann gjørt ymiskt, sum er strangliga bannað. Hakkarin sendi eitt skriv út, har hann nýtti nummar, adressu og pening hjá Føroya Stiftstjórn, har Føroya Stiftstjórn gav møguleikan at vinna fleiri mió. kr.



Í skrivinum stóð, at upprættar tú eina konto, og teknar tú teg sum lim hjá Føroya Stiftstjórn, hevur tú møguleikan at vinna stórar peningaupphæddir. Hakkarin hevði eisini lagt ymiskar ónærisligar myndir inn á heimasíðuna hjá Føroya Stiftstjórn. Hakkarin vildi ikki gera nakað heilt álvarsamt viðvíkjandi peningastuldri ella stuldri av privatum tilfari, men bert at snýta og nýta heimasíðuna hjá øðrum.

Elektron sigur, at hetta ikki er eitt ókent fyribrigdi, tí fleiri virkir hava verið úti fyri tí sama. T.d. kunnu nevnast Smyril Line, Telefonverkið, Formula og Elektron.

Føroya Stiftstjórn hevur syrgt fyri, at slíkt ikki endurtekur seg, og hava tey nú bøtt um trygdarviðurskiftini inni á internetinum.

Málið er ikki meldað til løgregluna.


NÝTT GRUNDSKEIÐ Í

NAVISION FINANCIALS

BYRJAR TÝSDAGIN 3 MAI, KL. 9:00

formula.fo

Atlantic Airways

# Søkir eftir húsum í Vágum

Atlantic Airways søkir eftir einum húsi í Sørvági ella nærhendis til leigu í fýra mánaðir, frá juni til september, møguliga longri. Húsið skal vera í góðum standi, hava innbúgv, hava fýra kømur og tvey baðirúm. Tørvur er á húsinum sum skjótast.

Ynskir tú nærri upplýsingar, ring á tel 34 10 00 til Kent L. Christensen

ATLANTIC AIRWAYS
Tel 34 10 00 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo